## DAGSINS MEINING

# Dupultmoralur í góðum føroyskum stíli

Eitt er at vera moralskur. Eitt annað er at vera dupultmoralskur. Føroyingar hava sum heild ein góðan moral, sum botnar í góðari siðvenju og kristiligum støði. Men harafturat eru føroyingar dupult-moraskir, verður vanliga sagt. Ja, heimsmeistarar í dupultmorali, siga summi.

Eitt dømi um dupult-moral føroyinga kom aftur til sjóndar nú um dagarnar. Í síðstu viku kunnaðu tveir studentaskúlalærarar um ein hvann-snaps, sum teir hava arbeitt við í fleiri ár. Tey, sum hava roynt henda snapsin, lata væl at honum. Hann hevur ein góðan og rundan smakk.

Men teir báðir, Jógvan Dahl og Finnur Lútzen, hava ikki lov at gera snapsin. Teir hava søkt áður, og teir hava søkt aftur nú, men Vinnumálaráðið hevur vent tummilin niður eftir. Teir fáa ikki loyvi at gera snapsin, og tað merkir, at føroyingar kunnu hvørki drekka ella bjóða ein føroyskan snaps.

Í grundini er slettis ikki talan um nakra grundframleiðslu. Tað, Jógvan og Finnur hava søkt um, er at sleppa at innflyta ráevni, reint spritt, og síðani lata hvonn ella onnur evni "trekkja" í sprittinum. Úr hesum fáa vit so hvannsnapsin.

Og hetta er ikki annað, enn tað sum nógv gera. Fólk keypa okkurt snapsaslag, sum ikki er so herskið, t.d. Brøndum, og lata kryddurtir av ymsum slag trekkja í snapsinum eina viku ella tvær, og so ført tú ein snaps, ella ein "bitter", sum tær líkar.

Alt hetta kunnu vit innflyta og keypa. Ja, Rúsdrekkasøla Landsins selir 100.000 tals litrar av vodka, snapsi, gin, whisky, konjakki, likøri, víni o.s.fr. um árið - ikki minst í hesum døgum - men vit kunnu ikki sjálvi gera ella framala ein føroyskan snaps, so vit høvdu okkurt føroyskt at bjóða.

Tað sama var við ølinum. Vi kundu "bestilla" danskt og annað útlendskt øl, men vit kundu ikki bryggja førosykt øl, fyrrenn lóggávan varð broytt í 1980, tá Føroya Bjór og Restorffs Bryggjarí fingu lov at bryggja føroyskt øl. Í dag er tað ein sjálvfylgja, men áðrenn lóggávan varð broytt, hoyrdust nógvar dómadagsprædikur.

Tá var alt í lagi, at vit "bestiltu" øll, men ikki at vit bryggjaðu. Ídag er alt í lagi, at vit keypa útlendskt brennivín, men vit skulu bara ikki gera tað sjálvi! Hetta er dupultmoralur í besta føroyska stílinum! Ja, eitt tjóðareyðkenni, ja, samleiki føroyinga.

Tá eru grannarnir fyri vestan frægari. Íslendingar gera fleiri søg av brennivíni og kendast man "Svartideyði" - Brennivín - vera, og ikki er teir føroyingar fáir, sum í hesum døgum keypa sær eina fløsku av "Svartadeyða", nú vit fara at halda tjóðarhátíð okkara og minnast deyða Ólav Heilaga.

Skoytast skal uppí, at hóast alt var tað áhugavert at síggja Dimmaætting ígjár, sum hevur skatta dýpið millum løgtingslimirnar. Kanningin vísir, at ein meiriluti vendir dupultmoralinum bakið, og heldur, at tað skal vera lov at gera ein føroyskan snaps. So kanska kunnu vit skeinkja ein føroyskan snaps á ólavsøku næsta ár!

**Sosialurin**

# Verjuovastin á vitjan

PRESSEMEDDELELSE

*P. Skovgaard*
*oberstløjtnant*
*Presseofficer*



- Forsvarschefen besøger Færøernes Kommando den 25. - 27. juli 2003.
- Formålet hermed er at aflægge tjenestestedsbesøg, der vil være general Helsøs første besøg på Færøerne som forsvarschef.
- Ud over at besigtige installationerne i Mjørkadal og på Sornfelli, er der planlagt sejlads med inspektionsskibet Hvidbjørnen.
- Forsvarschefens program omfatter besøg i Kirkjubøur og på Loran-stationen ved Eiðe, samt - hvis vejret tillader - på Mykines.
- General Helsø er 55 år og har gjort tjeneste i Forsvaret siden 1968. Han tiltrådte i 2002 stillingen som forsvarschef, der er Forsvarsministerens militære rådgiver, med ansvar for Forsvarets organisation, uddannelse og anvendelse. Forsvarschefen er ansvarlig for ca. 93% af forsvarsbudgettet, som er på ca. 18 mia. kr.
- Forsvarschefen og hans ledsagere fortsætter til Grønland efter besøget på Færøerne.

# Tey grønu í Føroyum

**Hans Birgir Hansen**

Upplýsing: Endamál okkara er at virka fyri umhvørvisligum og nærdemokratiskum politikki við at seta fólk í uppskoti til Føroya Løgting!

**Vistfrøði og umhvørvi**
Tey grønu vilja steðga teirri vaksandi dálkingini og eitranini av matvørum og umhvørvi. Hetta skal gerast við munagóðum forboði móti dálking og eitran av umhvørvinum og í framhaldi við einum fíggjarpolitikki, ið virkar soleiðis, at tað lønar seg at vera umhvørvisvinarlig og halda fast um vistfrøðiligu javnvágina í náttúruni.

Tey grønu vilja virka fyri einum samfelag, ið bjóðar lívsvirði fram um verandi samfelagsins miðsavnan av støðugum matriellum vøkstri og støðugt vaksandi nýtslu. Vit eru ikki ímóti tøkniligum framburði, men skal trivnaðurin hjá menniskjum ikki gerast gjald fyri hendan.

**Spjaðing og fólkavald**
Tey grønu ganga ímóti miðsavnan av valdi innan framleiðsluna. Vit vilja spjaða framleiðsluna, so at sjálvbjargni verður um landið. Vit ganga inn fyri demokratiið, innanfyri fyritøkur, t.d. samtøkur og fyritøkur har starvsfólki eigur part, men ganga ímóti fíggjarligum »demokratii«, ið verður stýrt av óviðkomandi leiðslum ella grunnum.

Tey grønu ynskja at vaksandi skrivstovuveldið og miðsavnaða stýringin, við valdsdeplum og serfrøðingarveldið, verður broytt til eitt spjatt nærdemokrati. Vit hava yvirlit yvir, at avgerðir verða, í størsta mun, tiknar á staðnum. Málini viðvíkja, t.d. tí kunnu vit ikki taka undir við EEC, soleiðis sum tað er skipað í løtuni.

Tey grønu ynkja, at hvørt menniskja, í mesta mun, umsitur tilveru sína. Vit standa fyri frælsi, einans avmarkað av frælsisrætti annara. Tískil ynskja vit heldur ikki at áleggja øðrum menniskjum eina samfelagsskipan, ið gongur ímóti ynskjum teirra.

**Sosial trygd**
Tey grønu virka fyri, at øllum verður tryggja líkinda góðir livimøguleikar, tað snýr seg um bústað, heilsu, útbúgving og arbeiði. Men verandi almannaveldið er skrivstovuveldið, fløkt og serstakliga kostnaðarmikið at umsita. Almannaskipanin eigur tískil at verða skamtað soleiðis, at ein og hvør, ið av eini ella aðrari orsøk er vorðin arbeiðsleysur, verður trygjaður eina skattafría minstuløn. Hendan minstalønin eigur annars, í mest møguligan mun at vera tillutað øllum borgarum. Hendan minstulønin skal kunna lívbjarga einum menniskja, men skal tó vera møguleiki hansara, ið ynskir so, at vaksa um livifót sín við at átaka sær starv.

# Ólavsøkan í Føroyahúsinum

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 27. juli: Opið kl. 14 – 18 .

Fernisering 15 – 17 við tveimum listafólkum, Niels Salmony, 59 ár, úr Trongisvági, sjálvlærdur, hevur oljumálningar í stovuni og norðmaðurin Bjørn Lerberg, sum er útbúgvin innan listsøgu, hevur kalt glas, raku og pit-fire á 1. hædd. Hansara tema eru: fuglur, fjøll og fiskur.

Føroyahúsið bjóðar sneisabitar og vín. Eisini verður tónleikur.

Mánadagin 28.juli, Ólavsøkuaftan: Opið kl. 14–01.

Kl. 14–21: Matsøla við føroyskum viðskera, nýbakaðum pannikøkum, vaflum o.a.

Kl. 15–17.30 Vit lýða á kappróðrarsendingina o.a.

Kl. 18: Ólavsøkan sett og felagssangur. Virgar Dalsgaard heldur røðuna

Kl. 20.30–01: Kafékvøld og dansur. Ian Onghamar og Lítli Jóhan, Jóhan Danielsen spæla til kafékvøldið og dansin. Eisini verður farið upp á gólv.

Týsdagin 29.juli, Ólavsøkudag: Opið kl. 14–23.

Kl. 17.00 Ólavsøkugudstænasta í Elaskirkjuni. Bergur Jacobsen prædikar

Kl. 18–20: Ólavsøkubuffet: Leskiligt sjálvtøkuborð við fleiri rættum, saltum og øðrum + kaffi og smákøkur fyri 100 kr.

Kl. 20–23: Hugnakvøld við felagssangi, tónleiki. Páll Sólstein spælir klaver og Bergur Jacobsen spælir klarinett. Martin Fjallstein heldur „midnáttarrøðuna" uml. Kl. 21.30

Øll eru vælkomin og øllum ynskja vit góða ólavsøku!!!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Ólavsøkan – tjóðarhátíð okkara



*Kjartan Stakksund*

Nú tað aftur stundar til ólavsøku, eru vit mong sum leggja leiðina til Havnar fyri at halda ólavsøku, og sum øllum kunnugt, er tað ymiskt, sum ólavsøkan verður hildin. Men øll vita vit, hví vit halda hesa tjóðarhátíð. Ólavur hin heilagi, sum fall á Stiklastøðum hin 29. juli ár 1030, bert tríatifimm ára gamal, hevjaði krossmerkið hátt okkara millum. Tí eigur ólavsøkan at verða hildin við spekt og sóma, og við virðing fyri tí sum heilagt er.

Sum áður nomið við, er tað ógvuliga ymiskt, hvat vit leggja mest dent á undir ólavsøkuhaldinum. Hjá mongum í landið okkara er tað ítrótturin, sum fær eitt sera stórt pláss í lívinum, og er tað eisini ítrótturin sum í ólavsøkuskránni hevur rúmar ræsir. Tað er ógvuliga vakurt at síggja ein stóran part av okkara ítróttarungdómi koma í stórari skrúðgongu og í sínum litføgru eyðkennisbúnum, inn á tinghúsvøllin, har tey standa við spekt og sóma og lýða á tá ólavsøkan verður sett. Spenningurin er stórur ímillum tey, nú tey standa fyri stórum avbjóðingum. Tí er tað sera umráðandi at íðka ítrótt við røttum ítróttaranda.

### Guds orðs boðan

Sum mangar ferðir nevnt áður, so kemur nógv fremmandafólk at vitja oyggjar okkara á sumri, og mong av hesum fremmandafólkum vilja uppliva ólavsøkuhald okkara. Tí er tað ógvuliga umráðandi, at vit, sum eru við til ólavsøkuhaldi, vísa spekt og sóma og eisini hava virðing fyri tí sum heilagt er. Á hesi stóru tjóðarstevnu okkara er tíðanbetur Guds orð ein fastur táttur í ólavsøkuskránni báðar dagarnar. Latum okkum takka Gudi fyri, at tað eru menniskju sum vilja, eins og Ólavur hin heilagi, hevja krossmerki hátt millum fólk okkara, eisini á hesi stóru stevnu. Tað er tí umráðandi at vit, sum eiga Jesus í hjørtum okkara, sameint biðja Gud um hansara ríku signing yvir gudstænastum og møtum hesar dagar, soleiðis at Heilagi Andin fær loyvið at tala til okkara fólk undir Guds orðs boðan bæði innan- og uttandura.

Ólavsøkumorgun uppliva vit at síggja skrúðgongu úr tinghúsinum og oman í dómkirkjuna (Havnar kirkju). Hetta ber okkum prógv um, at hann, sum øllum valdar, vil sigan fólk okkar, bæði gerandis og heilagt. Hetta, at teir politisku myndugleikarnir saman við kirkjuligu myndugleikunum, fara úr tinghúsinum og saman traðka kirkjugøtuna, ber okkum boð um at kristindómurin hevur djúpar røtur í fólki okkara. Men hóast tað, so er og verður tað altíð ein persónlig avgerð ímillum Gud og tað einstaka menniskja. Vit mega í øllum førum taka eina persónliga avgerð yvirfyri lagnu okkara í ævinleikanum; annaðhvørt eru vit frelst ella liva vit burtur frá Gudi og mega glatast í allar ævir. Tá lívið her er at enda komið, er náðitíðin farin og allur møguleiki fyri frelsu er farin; men Gud fái lov og tøkk fyri, at enn í dag stendur náðihurðin opin fyri einum og hvørjum, sum vil koma til Guds ígjøgnum Jesu fullgjørda verk á Golgata. Eisini ger hesin møguleiki seg galdandi á ólavsøku, við tað, at tað eru menniskju, sum eru Guds kallið lýðin og vilja bera hendan glaða boðskap út á ólavsøku, bæði innan- og uttandura. Gud signi ein og hvønn til at steðga á og lýða á tað, sum Harrans vitnir hava at bera fram um Guds kærleika við Jesusi Kristi, eisini hesa ólavsøku.

Eg vil hervið enda við einum ólavsøkusangi, sum eg havi yrkt til ólavsøkuna 2003. Góða ólavsøku øll somul.

## Ólavsøkusangur

Lag: Føroyingar, sum her nú koma saman

1. Vit á ólavsøku koma saman,
hitta kenningar og vinir við;
møtast vit í álvara og gaman,
menna vilja góðan gamlan sið.
Tað er okkum øllum mikil gleði,
at vit saman hugna okkum her;
Gud alvaldi gevur okkum megi,
:,: so tað spekt og sóma við sær ber. :,:

2. Merkið veittrar hátt á Áarvegnum,
ber oss boð um ólavsøku her;
Ólavur, hann fall á hesum degnum,
heiti halgimenni hann jú ber.
Latum okkum aldri navn hans gloyma,
tí hann krossin hevja vildi hátt;
navn hans vilja vit í hjarta goyma,
:,: tí hann vildi semju, vildi sátt. :,:

3. Ólavsøkan er vár tjóðarstevna,
ung og gomul ganga lið um lið;
eftir Áarvegnum, sum vit nevna,
mong sum vit her vilja kennast við;
spáka sær ein túr í Havnar býi,
vilja njóta lívið her og nú,
gloyma alt tað tunga strev og stríði,
:,: byggja millum ættir várar brú. :,:

4. Ólavsøkuaftan er tann dagur,
tá ið ólavsøkan verður sett;
mangur maður er tá sera glaður,
og um veðurvánir verður mett.
Kappróður og annað er á skránni,
sum jú hoyrir hesi stevnu til;
misjøvn eru líkindir á vágni,
:,: tað má verða sum tað verða vil. :,:

5. Eitt vit ongantíð her mega gloyma,
at Guds orð, tað hevur allan mátt;
latum okkum tí í hjarta goyma,
alt sum orð Guds ber oss inn um gátt.
Frelsutilboð gott her til oss ljóðar,
Jesus elskar okkum stór og smá;
syndarum hann fyrigeving bjóðar,
:,: frið í hjarta kunnu vit her fá. :,:

# Stígum fast eftir nótum

**Føroysku kvæðaløgini koma nú út í bók. Á samkomu í Norðurlandahúsinum í kvøld verður bók við kvæðaløgunum løgd fram**

BÓKAÚTGÁVA

Nú koma eisini kvæðaløg okkara út í bók, eins og vit í áravís hava havt sjálv kvæðini á prenti.

Tað er Marianna Klausen, sum hevur savnað føroysku kvæðaløgini í eina stóra bók. Ikki færri enn 735 síður við nótum. Tróndur Patursson hevur prýtt permuna, og forlagið Stiðin gevur út.

Tað eru fimm ár síðan, Marianna Klausen fór undir at savna føroysku kvæðaløgini. Hon hevur brúkt upptøkur, sum hon hevur fingið frá Útvarpi Føroya, Sjónvarpi Føroya, Fróðskaparsetrinum, privatfólki og eini rúgvu av øðrum keldum.

Tapð er stórarbeiði, Marianna Klausen nú leggur úr hondum. Yvir 2.000 upptøkur hevur hon funnið fram, og varð hvør einasta av hesum skrivað niður við hond, áðrenn farið varð undir at finna fram til, hvørjar vóru so líkar, at ikki var neyðugt at taka allar við í bókina.

Útgevararnir vænta, at hendan útgávan kann vera við til at økja áhugan fyri føroyska dansinum. Tí nú ber til eisini at læra seg løgini eftir bók. Alt fleiri føroyingar duga at lesa nótar, og soleiðis kunnu teir eisini brúka hesi løgini.

Samkoman í Norðurlandahúsinum, har bókin verður løgd fram verður í kvøld klokkan 19.30.

**ej**

